MENTAMÁLARÁÐIÐ

FÓLKASKÚLIN

FØROYSKT
9. FLOKKUR

Mánadagur 26. august 2013
kl. 08.30 - 12.30

Mynd: Gulakur Zachariassen

Loyvdir hjálparmiðlar: Allir hjálparmiðlar eru loyvdir

1 Amnesty

- Greina og tulka yrkingina
- Búmerkið hjá Amnesty International er kertuljósið við píkatráði rundanum. Sig tína hugsan um tað
- Hugleið um, hvønn týdning tú heldur, Amnesty International hevur sum felagsskapur

AMNESTY
boðar frælsi boðar frið
komið øll og rópið við
um Amnesty, ja Amnesty.

Kring allan heim í nógvum londum
er tíverri so
at fólk í varðhald verða blakað
uttan orð og boð
rættargongd er ókent orð
rættarskipan løgd í sor
hesi lond tey fremja fólkamorð.

Kenni ein ið tikin varð á vegnum
sum hann gekk
foreldrini tey kundu bara staðfesta
hann var vekk
ongin ímynda sær kann
hvørjar ræðuleikar hann
gjøgnumgekk til Amnesty hann fann.

Og er tað tí av størsta týdningi
at eg og tú
ikki bara yppa øksl við okkara "ajú"
men standa saman lið um lið
til fólk á jørð so við og við
ikki nýtast biðja um amnesty.



Robert McBirnie, 1990

Amnesty International er ein heimsumfatandi mannarættindafelagsskapur, sum er grundaður á Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um Mannarættindi frá 1948 og aðrar altjóða góðkendar samtyktir um mannarættindi.

Føroya deild hevur sett sær sum mál at: 1. Varpa ljós á og upplýsa um mannarættindi (átøk, tiltøk, undirvísing, undirvísingartilfar). 2. Upplýsa um mannarættindabrot, ið fara fram kring heimin (árliga ársfrágreiðingin hjá altjóða felagsskapinum, frágreiðingar, tíðindi). 3. Halda eygað við mannarættindastøðuni í Føroyum *(amnesty.fo)*

Orðið Amnesty merkir: Fyrigeving, miskunn, *(løgfr.)* náðing, griður, hópnáðing *(ofta fyri politisk misbrot)*; *give a.* geva grið, náða, sleppa undan ákæru *(sprotin.fo)*

10. desember er Altjóða Amnestydagur. Tá tendra fólk um allan heim kertuljós og seta tað á vindeygakarmin.

1. Tað myrka húsið

- Greina og tulka stuttsøguna

Yvirskrift: Tað myrka húsið

Altíð steðgaði eg á, tá ið eg kom nær tí myrka húsinum. Bussurin steðgaði heilt nær við húsið, og hvønn dag hugdi eg upp í tað stóra vindeygað, ið vendi út ímóti vegnum. Og tað gretti ikki, at eg ikki sá eina hond hála gardinuna eitt sindur frá, so hesin persónur kundi síggja út. Eg kulsaði, tí tað sá so óhugnaligt út. Ongantíð hevði eg sæð persónin, ið búði í tí myrka húsinum. Gardinurnar vóru altíð væl drignar fyri, og úthurðin var altíð aftur.

Men eg hevði hoyrt frá teimum vaksnu, at ein maður búði einsamallur har, og tá tað bleiv myrkt, kundu tey síggja eitt svart koma krúpandi út ígjøgnum portrið og seta seg á eina súkklu. Bil hevði hann vist ongan. Hann var ofta í svørtum regnfrakka við hettu; frakkan hevði hann knappað og strammað hettuna væl um høvdið. Hann tosaði ikki við nakran, men pápi og mamma, ið høvdu kent hann, síðan hann var lítil, heilsaðu upp á hann, tá tey møttu honum niðri í matvøruhandlinum, har tey eisini keyptu, og hann nikkaði aftur.
Annars koyrdi hann alt, hann keypti, niður í kurvuna og hugdi ongantíð upp á nakran, setti seg upp á súkkluna og súkklaði heim. Hann læt øll hava frið. Men soleiðis hevði hann ikki altíð verið. Foreldur hansara vóru fryntlig og prátingarsom, og tá ið myrkt var úti, var ljós í hvørjum glugga, so húsini sóu sera innbjóðandi út. Tey áttu tveir synir, tann, sum nú búði í húsinum, og so ein annan. Teir gingu í sama skúla, og tvey ár vóru ímillum teirra. Pápi segði altíð, at bróðirin, ið nú búði í húsinum, hevði tað ikki lætt. Eg spurdi pápa, um hann ikki kundi siga mær frá onkrum um mannin, tí eg var blivin eitt sindur forvitin. Eitt kvøldið, mamma var úti, byrjaði eg aftur at tosa um mannin í tí myrka húsinum. Tá legði pápi avísina frá sær og suffaði. Hetta tekur eina løtu at siga frá, segði hann. Síðan fór hann at gera eina kannu av te og smurdi tveir rosinubollar, annan til mín. Sjálvur drakk eg mjólk.

Síðan byrjaði pápi at siga frá.

-Tá ið pápi og mamma komu higar at búgva, høvdu tey í tí myrka húsinum búð har í fleiri ár. Mamma tín og eg komu at kenna familjuna. Tey áttu tveir dreingir, og vóru teir sera hjálpsamir og fólkaligir. Teir kundu banka uppá fyri at spyrja, um teir skuldu fara eitt ørindi, og onkuntíð manglaði mammu tíni okkurt, so hon sendi teir oman í handilin at keypa. Hetta var, áðrenn tú vart føddur, helt pápi fram.

Vit høvdu verið gift í nøkur ár, áðrenn tú komst í verðina. Men tá fingu vit eisini nokk at takast við, smíltist pápi, og eg skundaði mær at smílast aftur, tað var sera hugnaligt at sita saman við honum og hoyra hann siga frá. Eg hugsaði tá, hvussu glaður eg var at eiga ein pápa.
Pápi helt áfram.

- Ein dagin hendi tað, at annar beiggin druknaði. Teir vóru báðir farnir at svimja í einum lítlum hyli; ikki var hann djúpur heldur, og har svumu teir ofta. Eingin veit fyri vist, hvat hendi har, uttan hin beiggin, ið segði, at beiggi sín fór undir og kom ikki upp aftur. Hann helt, at hann spældi býtt, men so var ikki. Tað, ið fólk ikki kundu fyrigeva honum, var, at hann ikki leyp útí at hjálpa beiggjanum beinanvegin, men hann bíðaði ov leingi. Tá ið hann leyp eftir honum og dró hann upp á land, var hann deyður.

Foreldrini og øll, ið kendu dreingirnar, trúðu ikki beiggjanum, sum livdi eftir, tí tey hildu, tað ljóðaði eitt sindur løgið, at hann ikki hevði kunnað bjargað honum, og at hann ikki hevði rópt eftir hjálp straks. Men hesin helt fast við sína søgu, at beiggi hansara var deyður, tá ið hann dró hann upp á land. Foreldrini skiltu einki, hví hann ikki var lopin útí beinanvegin, tá ið hann sá beiggjan fara undir? Løgreglan tók beiggjan inn til avhoyringar, men hann segði tað sama, sum hann hevði sagt fyri foreldrunum, at hann helt, at beiggin spældi og væntaði, at hann kom uppundan aftur.

Har høvdu ongin vitni verið til staðar, og løgreglan kundi ikki halda beiggjanum í varðhaldi. Sjálvt um løgreglan, foreldrini og fólk, ið tey kendu, hildu tað vera sera løgið, at sonurin ikki hevði handlað beinanvegin, men sat á einum steini tætt hjá. Men sonurin segði seg ikki kunna gera annað, enn hann hevði gjørt.

Foreldrini vóru í knúsi og komu ongantíð fyri seg aftur. Eftir hesa hending vóru húsini altíð myrk og sóu út sum eitt spøkilsishús. Tá ið nakrir mánaðir vóru gingnir, komu foreldrini og beiggin út ígjøgnum portrið við tveimum kuffertum og settu seg inn í ein leigubil. Tey fluttu til ein annan bý at búgva. Húsið stóð tómt í nøkur ár. Men so ein dag var ljós aftur at síggja í húsinum. Tá var tað beiggin, ið var komin heim aftur at búgva. Men gardinurnar blivu ongantíð drignar frá, og hann helt seg innandura og fór bara út, tá ið honum vantaði okkurt til matna, segði pápi og fekk sær upp í aftur krússið á triðja sinni.
Hetta var spennandi at fáa at vita, og pápi dugdi óføra væl at siga frá.

Men pápin helt áfram eftir at hava sutlað á teið og bitið burtur av bollanum.

- Tað løgna var, at eingin skilti, hví bróðirin kom aftur í barnaheimið at búgva. Hann var uttan iva blivin undarligur - kanska av samvitskubiti - og vildi einki hava við nakran at gera. Hann sat bara framman fyri vindeyganum og hugdi út ímillum eina sprekku í gardinini, segði pápi.

Nú eg hevði hoyrt alla søguna um brøðurnar báðar, skilti eg tann livandi beiggjan betur; hetta at hann sat og goymdi seg aftan fyri gardinurnar. Tí um hann var ósekur ella ikki í tí, sum var hent beiggja hansara, trúði eingin honum, ið kendu hann. Tey hildu øll, at hann kundi havt bjargað beiggja sínum.

Næstu ferð, eg fór úr bussinum og gekk framvið hjá honum, hugdi eg upp og sá, at hann koyrdi gardinuna eitt sindur frá. Hesa ferð tókti mær synd í honum heldur enn at vera bangin. Pápi hevði rætt, tá ið hann segði, at hann hevði tað ikki lætt. Eg hevði spurt pápa, um hann helt beiggjan vera sekan ella ikki. Men pápi trúði tí, drongurin hevði sagt frá fyri so nógvum árum síðan, men pápi skilti ikki, hví onnur ikki gjørdu tað sama. Foreldrini vístu seg heldur ikki at trúgva honum, hóast tey ikki søgdu tað við orðum.

Hann var blivin tungur í huga, tí foreldrini tosaðu lítið og einki við hann, síðan vanlukkan hendi. Tí valdi hann at koma aftur til barnaheimið, tí har hevði hann nógv góð minnir um beiggja sín og føldi seg nærri honum. Meðan eg stóð uttan fyri tað myrka húsið, hugsaði eg um at fara og banka uppá hjá honum og bjóða mær at fara okkurt ørindi, líkasum hann og beiggin plagdu at ganga ørindi fyri míni foreldur, tá ið teir vóru smáir.

Birna Breckman, Einglavakt, 2017

2 Ein litaður vavgreytur av minnum úr Helviti

- Greið í stuttum frá, hvat greinin er um
- Hvussu er blaðgreinin skipað?
- Greið frá samskiftinum, (sendara, miðli og móttakara)
- Sig tína hugsan um greinina. Er hon viðkomandi í dag? Grundgev fyri tínum svarum

Ein litaður vavgreytur av minnum úr Helviti

Tá eg játtaði at skriva Afturhvarv, var eg greiður yvir, at hetta ivaleyst fór at verða ein tungur burður. Heilin er eitt áhugavert tól, ið sera hegnisliga verjir okkum fyri nógvum keðiligum. Eg minnist ikki nógvar keðiligar hendingar úr mínum lívi. Tær flestu eru goymdar onkrastaðni í dulvitskuni.

Eg veit, at míni skúlaár í stóran mun vóru ein rød av ringum upplivingum, happing, avbuking og persónligum niðurløgum. Men at skula minnast hesar aftur og at festa tær á blað - tað fór neyvan at verða lætt, so mikið visti eg frammanundan. Men eg hugsaði, at hetta ivaleyst kundi gerast nokkso sjálvterapeutiskt. So eg játtaði. Men nú deadline er beint hinumegin hornið, so noyðist eg at viðganga, at hevði eg vitað, hvussu trupult hetta fór at verða, hevði eg takkað nei, tá ritstjórin ringdi til mín.

Eg havi grópað og leitað í dulvitskuni, við tí úrsliti, at onkur minni eru komin fram. Alt er brýnt av tíðarinnar tonn. Ivaleyst heldur litað og í einum vavgreyti.

Happingin gjørdist ov nógv

Eg byrjaði í Gulaskúla í 1. flokki um summarið í 1980, eftir trý ár í Gulaskúla fluttu vit nøkur ár oman í Brúnaskúla, áðrenn vit fluttu niðan í Venjingarskúlan. Tað eru serliga minnini frá tí óvanliga harða umhvørvinum á gongunum á Venjingarskúlanum, sum eru ring. Happingin, sum gjørdist verri og verri.

Í heystfrítíðini í 8. flokki skifti eg skúla. Happingin og ágangurin í Venjingarskúlanum var vorðin so mikið nógvur, at foreldur míni saman við flokslæraranum hjá paralellflokkinum gjørdu av, at okkurt mátti henda. Eg flutti oman í býin at ganga í Kommunuskúlanum. Endiliga fekk eg kensluna av samanhaldi og felagsskapi í einum flokki. Skúlin var ikki longur ein plága, eins og hann hevði verið í Venjingarskúlanum.

Nýggjan flokslærara

Okkara flokkur í Venjingarskúlanum var ein trupul flokkur, ella ein problemklassi, sum tað nokk varð kallað tá. Í sjeynda flokki fekk flokslærarin hjá okkum nóg mikið. Hesin eldri maður hevði mist tamarhald á okkum og orkaði ikki stríðið longur. Hann vildi sleppa av við okkum. Upprunaliga hevði hann tikið okkum frá einum øðrum lærara, ið heldur ikki orkaði okkum longur, nøkur ár frammanundan. Eingin av teimum lærarum, ið kendu okkum, vildi taka hendan flokkin, vit vóru ov strævin. Ein nýklaktur lærari av læraraskúlanum byrjaði hetta árið í Venjingarskúlanum, og skúlaleiðslan gav henni henda truplasta flokkin í skúlanum. Hon var fitt og ikki so øgiliga nógv eldri enn vit. Neyðardýrið ánaði ikki, hvat hon hevði í væntu.

Samlaðu trupulleikarnar

Hetta sama árið byrjaðu nakrir nýggir næmingar í okkara flokki. Her var talan um næmingar, ið

høvdu gjørt ov illa fortreð og ikki hóskaðu inn í øðrum skúlum og tí vórðu fluttir. Skúlaleiðslan vildi ikki órógva paralellflokkin, ið fungeraði væl. So hesi óhepnu elementini vórðu koyrd í okkara flokk. Hann var jú so trupul frammanundan. Úrslitið varð sum væntað. Happingin gjørdist alsamt ógvisligari og fyri okkum, ið vóru tey vanligu ofrini, gjørdist lívið eitt satt helviti.

Eg átti tørn

Vit vóru 3 næmingar, sum vanliga stóðu fyri skotum, tá happað varð. Tað var eitt sindur í tíðarskeiðum, og byrjanin av 8. flokki var mítt tíðarskeið. Eg varð læstur inni í skápum í fríkorterum, og tá eg ikki var tað, varð eg happaður ella bukaður. Minnist serliga væl eitt fríkorter. Tað var inni í okkara skúlastovu á niðastu gongd í Venjingarskúlanum. Teir vanligu dreingirnir løgdu á meg. Teir hildu mær niðri, kroystu andlitið niður í gólvið soleiðis, at eg ikki fekk vent mær. Eg hoyrdi onkran tendra ein tendrara, eg føldi hitan og luktaði sviðin hár. Eg var ræðslusligin, hugsaði:

- Teir seta eld á hárið á mær! Eg fór at gráta. Teir sleptu mær og flentu at mær. Tann, sum hevði tendraran, hevði sviðið hár á sínum egna armi. Hann hevði ikki sett eld á meg, men stóð har og flenti.

Mátti verja meg

Tað var tá, at eg skilti, at eg noyddist at verja meg á onkran hátt. Eg fekk onga hjálp frá lærarunum, systkini hjá mær vóru so mikið stór, at tey ikki gingu í skúlanum longur, og mínir bestu vinir gingu í øðrum skúlum. Eg var farin at ganga til Jiu-Jitsu, men eg dugdi ikki nóg væl til at verja meg ímóti flokkum av álopsmonnum. Eg visti, at skuldi eg fáa frið, mátti eg hava eitt vápn. Eg visti av royndum hjá einum, sum var illa happaður í einum eldri flokki, at tað ikki loysti seg at taka knív við. Eg hevði heldur ikki hug til veruliga at skaða nakran. Ella tað hevði eg nokk, men eg visti, at tað ikki var gongd leið. Eg vildi bara hava eitt vápn, ið hjálpti at halda álopsmonnum burtur. Heima fann eg eina jarnketu. Hon var ikki serliga tung, kundi liggja í jakkalummanum, uttan at hon sást. Men samstundis var hon nóg tung til, at man fekk ilt, um man varð sligin við henni. Ketan var fullkomiliga perfekt til endamálið. Eg var ikki líka bangin, tá eg fór í skúla morgunin eftir.

Flokslærarin hjálpti

Í fríkorterinum nærkaðust nakrir av teimum og ætlaðu at loypa á meg. Eg tók ketuna og sveiggjaði eftir teimum. Teir hildu seg burtur. Hetta gekk fínt. Tá fríkorterið var av, klagaði onkur av teimum til flokslæraran um, at eg hevði eina ketu. Henda unga og fitta kona gjørdi, sum ivaleyst flest allir rættsiktaðir lærarar høvdu gjørt. Hon tók ketuna frá mær. Men alt, ið eg sá, var, at tá eg hevði trupulleikar, fekk eg onga hjálp, men um eg vardi meg, so hjálpti hon teimum, sum vildu sleppa at buka meg. Eg var verjuleysur. Eg visti, at næsta fríkorter fór eg veruliga at fáa tað afturlønt. Eg var desperatur! Eg mátti hava ketuna aftur! Eg mátti fáa verju!

Flokslærarin spældi klarinett, og taskan við klarinettini stóð á pultinum. Eg tók taskuna og rann yvir til vindeygað, har eg helt taskuna út ígjøgnum tað.

- Tú fært taskuna, um eg fái ketuna, segði eg.

Hvat síðan hendi, minnist eg ikki. Eg veit, at eg fekk ikki ketuna aftur. Hetta er mítt síðsta minni frá Venjingarskúlanum.

Niels Uni Dam, úr Skúlablaðnum nr. 2, 2007



Niels Uni Dam er føddur í 1973. Hann er útbúgvin cand. comm.

3. Sveiggj

- Greina og tulka lýsingina
- Greið frá tí týdningi, lýsingar hava í okkara samfelagi

Yvirskrift: Sveiggj

At hava í huga, tá tú greinar og tulkar:
- lýsingaslag
- endamál/boðskapur við lýsingini
- sendari og móttakari
- bygnaður, t.d. forsýni, miðsýni og baksýni
- sambandið millum tekst og mynd
- litir, eygnariv, ímyndir
- eydnast tað lýsingini at fáa boðskapin fram? Grundgev!

Lýsingin liggur á framsíðuni saman við uppgávuni undir fylgisskjøl

4 Rým ikki frá mær

- Skriva eina stuttsøgu við heitinum "Rým ikki frá mær"

  Tú skalt skriva brotið niðanfyri av og lata **tað** vera endan á søguni

"Minn meg ikki á hatta," ropti hann, "ger so væl og halt kjaft við hasum."
Hon hvakk við av hansara grummu øði. Hon hevði ongantíð upplivað hann soleiðis fyrr, gavst at gráta og setti seg ræðslusligin aftur á hælarnar. Hann tók niður í lumman og kom fram við einum lummaturriklæði, hvítt við bláum rondum, og gav henni at turka andlitið við. So reisti hann seg og gekk burtur frá henni, og hon ropti aftan á honum í stórari neyð.
"Rým ikki frá mær, rým ikki frá mær!"

Brot úr "Eini hjún" eftir Jens Paula Heinesen.
Úr stuttsøgusavninum Rósa Maria (1995)



www.worldpress.com

www.flickrhivemind.net



www.deviontart.com

5 Lat ikki netið dálka tína framtíð

www.snar.fo/progv/

Greina og tulka lýsingina. Í tíni viðgerð skalt tú m.a. hugsa um:

- Hvat lýsingaslag er talan um?
- Hvat snýr lýsingin seg um?
- Hvat er endamálið við lýsingini?
- Hvør er sendari/móttakari?
- Hvørjir vinklar eru nýttir í upptøkunum? Og hvussu virka teir?
- Hvussu nýtir lýsingin ljóð og tónleik?
- Sig tína hugsan um lýsingina og hugleið um, hvørt slíkar lýsingar hjálpa ella ikki
- Ávirkar lýsingin teg? Grundgev fyri tínum svari